

*Gongst, sum ætlað hjá nýggja samtakinum, loysa fýra ísfiakatrolarar í dag – og Anfinnur Olsen, stjóri, væntar, at tey, sum ikki loysa í dag, loysa í morgin*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# oysa øll si vikuni

eigararnir áttu skipini. Skipið er klárt, men skal sýnast av Skipaeftirlitinum, áðrenn tað kann loysa aftur til fiskiskap.

Hann væntar, at sýnið fer fram í dag og gongst, sum ætlað, skuldu Rókur og Lerkur eisini verið klárir at loysa í dag ella í morgin.

## Skipini fyrst

Tá nýggja samtakið keypti skip og virkir, varð sagt, at skipini fyrst skuldu fáast aftur til fiskiskap, meðan virkini bíða eitt sindur.

Anfinnur Olsen sigur, at felagið fer at hyggja upp á virkini, tá skipini eru komin útaftur.

- Beint í løtuni kann eg ikki siga, nær fyrstu virkini lata uppaftur, men hesum partinum fara vit at taka okkum av, nú skipini hava lagt frá bryggju, sigur stjórin, Anfinnur Olsen.

vilmund@sosialurin.fo

# Høvuðs-sætið verður í Runavík

**Nú tað eru tvey feløg í Eysturoy, Varðin og Framherji, sum saman við Bacalao hava stovnað nýggja felagið, ið kemur at reka trý fiskavirki og seks ísfiskatrolarar, verður høvuðssætið hjá fiskivinnurisanum flutt úr Havn og inn til Runavíkar**



***Høvuðsskrivstovan hjá gamla Faroe Seafood lá í Havn - á fyrrverandi Bacalao, men hetta virkið var ikki við í keypinum hjá nýggja samtakinum. Nú verður so høvuðssætið hjá nýggja samtakinum í Runavík***

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Vilmund Jacobsen**

Anfinnur Olsen, sum er ein av trimum pørtum aftanfyri Framherja og sum nú er annar av stjórunum í nýggja samtakinum, segði herfyri, at nýggja samtakið fer at hava sína egnu søludeild, og at hendan verður skipað á høvuðsskrivstovu felagsins, sum verður í Runavík.

Hetta segði hann í samrøðu við Dimmalætting.

Høvuðsskrivstovan hjá gamla Faroe Seafood lá í Havn - á fyrrverandi Bacalao, men hetta virkið var ikki við í keypinum hjá nýggja samtakinum.

Nú verður so høvuðssætið hjá nýggja samtakinum altso í Runavík - og ikki í Havn.

## Grannavirki

Av teimum fýra virkjunum, sum nýggja samtakið keypti, er fyrrverandi Lynfrost í Saltangará og fyrrverandi Nykur á Toftum.

Í Runavík hevði Faroe Seafood flakaframleiðslu, serliga úr upsa, og á Toftum hevur í nógv ár verið saltfiskaframleiðsla.

Øll tey seks skipini, sum eru við í keypinum, hava øll árini siglt út av Runavík, eins og tey hava lagt veiðina upp á landingarmiðstøðini Kongshavn í Saltangará

Skipini eru soleiðis farin og komin um havnalagið hjá Runavíkar havn. Manningin er komin úr ymiskum heraðshornum í landinum.

## Kongshavn

Enn veit eingin, hvussu verður við landingarmiðstøðini Kongshavn, sum ikki er insolvent, men skal seljast, eins og allar aðrar ognir, sum vóru undir hattinum hjá Faroe Seafood-samtakinum.

Eini 25-30 fólk hava havt sítt tilknýti til landingarmiðstøðina, sum nú aftur hevur landað nøkur skip eftir steðg í ein mánaða ella so.

vilmund@sosialurin.fo